# Hetta er ikki ein

**HÚSMÓÐIR** - Eg haldi, at tað er í fínasta slag at búgva her á Kalsoynni. Men eg blívi rættiliga irriterað, tá eg hoyri fólk siga, at vit búgva á eini útoyggj, sigur 37 ára gamla Aslaug í Norðnástovu, sum býr í Mikladali. - Vit hava so mikið gott ferðasamband til Klaksvíkar, at tað er skeivt at siga, at Kalsoyggin er ein útoyggj. TAÐ er hon so ikki

Tekstur: Snorri Brend
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Mikladalur:** Klokkan er farin beint av 2 henda mikudagin í farnu viku, og Aslaug er so smátt farin at gera ein drekkamunn kláran til yngstu dóttrina, Bjørg.

Bjørg gongur í 4. flokki í Mikladals skúla, ið liggur beint hinumegin ánna. Fyri hana er skúladagurin brátt at enda komin, og tá er gott at vita, at hon hevur eina heimagangandi mammu.

Møðgurnar báðar eru einsamallar í húsi í dag: Maðurin er við skipi, og hini trý eldru systkini eru øll undir útbúgving í Klaksvík.

Nú kemur Bjørg rennandi so findarglað úr skúlanum. Hetta verður ein góður dagur: Fyrr um dagin høvdu tey vitjan av umboðum fyri tíðindatænastuna, og nú hittir hon tey aftur heima við hús. Og um eina løtu liggur leiðin til Klaksvíkar við Sam.

- Ja, næmingarnir eru hvønn hósdag í Klaksvík í skúla, og tí sleppa vit okkum bara avstað longu í dag. So kann Bjørg sleppa í svimjihøllina eina løtu, meðan eg geri nøkur ørindi í býnum. Og síðani fara vit norður til mammu, har vit yvirnátta.

- So tað er í fínasta slag at kunna kombinera tað heila soleiðis, sigur Aslaug sum er ættað úr Norðdepli, men hevur búð her í Mikladali síðani 1987, tá hon giftist Markusi.

Aslaug er heimaarbeiðandi húsmóðir, men hevur ávísar uppgávur at røkja: Hon vaskar skúlan í bygdini, hevur ábyrgd av bingjuplássinum og ansar egnum seyði og seyði hjá øðrum.

### Átta ferðir

Hóast hon er ættað norðanfyri tunlarnar á Borðoynni, hevur hon trivist væl her í Mikladali, næstnorðastu bygdini á Kalsoynni.

- Tað eru tey sum halda, at Kalsoyggin er ein útoyggj. Eg havi búð her í mong ár, men havi ongatíð hugsað nakað serligt um, at hetta er ein útoyggj, ella at tað er trupult ella ógjørligt at búgva her, vísir hon á.

Tað var kanska meiri aktuelt fyrr í tíðini, tá Barsskor var álitið hjá kalsoyingum. Í dag tosar eingin um farleiðina sum ein trupulleika.

Sam siglir upp í átta ferðir um dagin úr Klaksvík, bæði tíðliga og seint, eins og vegasambandið av Syðradali og norður til Trøllanesar er gott.

Nú kunnu fólk hava bilin standandi í túninum; tey kunnu luttaka við ymiskt frítíðarvirksemi í Klaksvík; tey kunnu sleppa til føðingardagar, kristiligar fundir, kvøldskúla, sjónleik og ítrótt á meginøkinum, og kunnu sleppa til hús aftur um kvøldið.

- Nei, vit hava so einki at klaga um í hesum sambandi, staðfestir Aslaug.

### Ganga í tunli

Aslaug í Norðnástovu hevur búð í Mikladali í nærum fjórðings øld, og hevur dámað væl her.

- Jú, mær dámar væl her norðuri. Eg kundi sjálvandi ynskt mær, at tað vóru fleiri yngri fólk í bygdini.

- Og skal eg vera heilt erlig, so er tað uppá ein máta einsligt her norðuri, men vit trívast kortini, slær hon fast.

- Eg hugsi serliga um dóttrina, Bjørg, sum er einasta skúlagentan úr Mikladali.

Tær báðar plaga at ganga túrar um kvøldarnar, ofta saman við øðrum. Tær koyra niðan til munnan á Trøllanes-tunlinum og ganga so til hin endan og aftur. Tað góða er, at her inni kunnu tær ganga, óansæð um vindur og regn leika í uttanfyri.

- Tað kemur næstan ikki fyri, at vit møta nøkrum bili, slær Aslaug fast.

### Bestilla

Er tað nakað sum Aslaug saknar í bygdini, so er tað ein matvøruhandil.

Av hesi orsøk er neyðugt hjá bygdarfólkinum at bíleggja vørurnar úr Klaksvík ella sjálvi fara hagar til handils.

- Skipanin er bara góð. Vit ringja til Inn-handilin í Klaksvík og bestilla vørurnar, og so hava vit tær her dagin eftir. Vørurnar verða koyrdar út tríggjar ferðir um vikuna, og hann sum koyrir vørubilin er so óførur, at hann setur vøruna inn í gongina.

- Í morgun kom hann við kraftfóðuri til seyðin.

snorri@sosialurin.fo

» **Vit ringja til Inn-handilin í Klaksvík og bestilla vørurnar, og so hava vit tær her dagin eftir**



**HANDIL**

*- Tað er gott at búgva her í Mikladali, men eg sakni tó ein handil og at tað vóru fleiri yngri fólk, sigur Aslaug í Norðnástovu, sum stendur í túninum hjá sær sjálvum, og við bygdarskúlanum í bakgrundini*